# VINNULIGIR MØGULEIKAR Í ARKTIS




19-11-2012

## Føroysk vinnuáhugamál í mun til Arktis

Ein frágreiðing um vinnuligar møguleikar í Arktis fyri limir í Oljuvinnufelagnum. Harafturat er ein meting um, hvussu farast skal fram fyri at styrkja um føroyska luttøku í vinnuliga virkseminum í arktiska økinum komandi árini.

SYNTESA
INNOVATION TO MARKET

# VINNULIGIR MØGULEIKAR Í ARKTIS

## FØROYSK VINNUÁHUGAMÁL Í MUN TIL ARKTIS

## FORMÆLI

Oljuvinnufelagið hevur heitt á Syntesu um at gera eina frágreiðing, har endamálið er at lýsa vinnuligu møguleikarnar í arktiska økinum fyri limir í Oljuvinnufelagnum.  Harafturat skuldi metast um, hvussu farast skal fram fyri at styrkja um føroyska luttøku í vinnuligum virksemi í arktiska økinum.

### Arbeiðssetningur

Við grundarlagi í tí greiningararbeiði, sum er gjørt í altjóða høpi, verður mett um møguleikar hjá limum í Oljuvinnufelagnum at gerast partur av tí virksemi, sum væntandi fer at fara fram innanfyri tey komandi 5 árini. Støðið verður m.a. tikið í politiskum tilmælum frá londunum kring Arktis, Arctic Council, NordRegio og OECD. Harafturat verður støði tikið í greiningum frá óheftum stovnum, s.s. the Chatham House, the Economist o.o.

Harafturat verður støði tikið í tí arbeiði, sum Føroya landsstýri ger í sambandi við, at Landsstýrið hevur sett sær sum mál at gera eina ætlan fyri, hvussu Føroyar best gagnnýta fyrimunirnar av broytingunum, sum henda í arktiska økinum. Arbeiðið er byrjað at gera eina miðvísa útgreining av hesum viðurskiftum.

### Ítøkiligar veitingar

Arbeiðið skal enda við eini frágreiðing  við hesum høvuðspørtum:

1) Samanumtøka av altjóða metingum um vinnuligt virksemi í Arktis nú og í longdini.

2) Samanumtøka av heilsufrøðiligum, umhvørvisligum og trygdarligum viðurskiftum, sum fara at gera seg galdandi í mun til virksemið í arktiska økinum.

3) Yvirlit yvir ítøkiligar verkætlanir, ið væntast at verða framdar komandi trý árini, og sum limir í Oljuvinnufelagnum kunnu bjóða seg fram at luttaka í.

4) Meta um kappingarligu fyrimunirnar hjá føroysku vinnuni í mun til hesar verkætlanir.

5) Uppskot um tilmæli til Føroya Landsstýrið, um hvussu føroysk vinnulig luttøka kann styrkjast, og hvussu Føroyar best gagnnýta fyrimunirnar av broytingunum, sum henda í arktiska økinum.

### Manning og skipan av arbeiðinum

Syntesa sp/f hevur staðið fyri arbeiðnum. Ólavur Gregersen, Cand. Merc. í altjóða handli, hevur  havt

ábyrgdina av at røkka arbeiðssetninginum. Eisini hava Gilli Trónd, M.Sc. Geography and Geo-informatics, M.Sc. Urban and Regional Management, og Katrin I. Gregersen, M.Sc. Supply Chain Management, verið við til at skriva frágreiðingina.

Arbeiðið varð byrjað 19. oktober 2012, og latið úr hondum tann 18. november 2012.

Syntesa Partners & Associates
Fyri oman Brúgv 2
510 Gøta
www.syntesa.eu

# INNIHALDSYVIRLIT

**ØKTI ÁHUGIN FYRI ARKTISK** ..... 4

**BÚSKAPARLIG MENNING Í ARKTISK** ..... 6

**OLJU OG GAS LEITINGAR Í ARKTIS** ..... 8

**RÁEVNI Í GRØNLANDI** ..... 10

Case I: London Mining ..... 10

Case II: Alcoa ..... 11

Case III: Greenland Minerals & Energy Ltd. ..... 11

**NORÐURLEIÐIRNAR - NORÐEYSTLEIÐIN OG NORÐVESTLEIÐIN** ..... 14

**AVBJÓÐINGAR Í ARKTIS** ..... 16

**KAPPINGARLIGIR FYRIMUNIR HJÁ FØROYSKU VINNUNI** ..... 18

**UPPSKOT UM TILMÆLI TIL FØROYA LANDSSTÝRIÐ** ..... 21

# ØKTI ÁHUGIN FYRI ARKTISK

Arktiska økið verður vanliga skilmarkað sum økið norðan fyri pólkringin (66° 33'N). Hóast hetta, verða Føroyar tiknar við sum hoyrandi til arktiska økið.



*Mynd 1: Arktiska økið er avmyndað við grønum*

Vaksandi áhugin fyri arktiska økinum kemst fyrst og fremst av útlitunum til atgongd til virðismikið tilfeingi, serliga í undirgrundini, men eisini til møguligar nýggjar fiskileiðir í arktiska havinum. Afturat hesum koma teir búskapar- og handilsmøguleikar, sum fylgja við munandi styttri siglingarleiðum millum Atlantshavið og Kyrrahavið norður um Russland og Kanada.

U.S. Geological Survey metti í 2008, at tað eru oljunøgdir svarandi til 90 mia. tunnur í undirgrundini norðan fyri pólkringin. Viðbrekna umhvørvið í Arktis ger, at nógv óttast ógvusligar avleiðingar av eini oljuvanlukku, um oljuframleiðsla veruliga tekur dik á seg. Røddir eru frammi um at banna olju- og gassframleiðslu í Arktis fyri at verja umhvørvið. Tey, sum eru ósamd í hesum, vísa á, at íbúgvarnir í Arktis hava sama rætt at útvinna olju, sum onnur hava havt í øðrum pørtum av heiminum.

Økti hitin í høvunum í norði kann m.a. hava við sær, at fiskastovnarnir fara at flyta seg longur norður. Ymisk sjónarmið eru um, hvussu samstarvast skal um nýggjan fiskiskap í Arktis, um so er, at ísurin minkar so mikið nógv, at nýggjar fiskileiðir gerast atkomuligar.

Uppskot eru frammi um møguleikan at víðka heimildirnar hjá verandi økisbundnu fiskiveiðifelagsskapunum. Í løtuni er NEAFC einasti fiskiveiðifelagsskapur, hvørs sáttmálaøki fevnir um part av arktiska havinum. Hinvegin halda eitt nú USA og ES, at so leingi, sum ongin heildaravtala er gjørd fyri umsiting av fiskastovnum í arktiska havinum, eigur fiskiskapur ikki at vera loyvdur. Sum heild verður tó hildið, at helst verður talan um nógv ár, áðrenn hesi viðurskifti broytast munavert, og altjóða leiðir í íshavinum verða opnar fyri fiskiskapi alt árið.

Skipaferðslan í Arktis er longu økt munandi. Umframt stórar búskaparligar møguleikar við øktari skipaferðslu í arktiska økinum fer økt virksemi eisini at seta størri krøv til tilbúgvingina í arktiska økinum, og neyðugt verður við eini greiðari felags fatan av, hvør hevur ábyrgdina fyri eftirlitið og stýring.

Fleiri vilja vera við, at vandi er fyri álvarsligum ósemjum millum londini í Arktis um tilfeingið í økinum. Limalondini í Arktiska Ráðnum gera tó nógv burturúr at vísa á, at londini ynskja at samstarva og at koma

ásamt um møguligar ósemjur á friðarligan hátt, m.a. við støði í Havrættarsáttmálanum hjá ST og øðrum viðkomandi altjóða sáttmálum.[1]

Hesum sjónarmiði eru mong tó ósamd í, serliga umhvørvisfelagsskapir sum WWF og Greenpeace. Felagsskapirnir vísa á, at ongin hevði ímyndað sær, hvussu støðan fór at vera í Arktis, tá Havrættarsáttmálin varð gjørdur í 1982. Tí verður mett, at Havrættarsáttmálin ikki tekur hædd fyri teimum avbjóðingum, sum Arktis stendur yvir fyri í dag.

Eitt nýtt hav í norði krevur ein nýggjan og betri sáttmálakarm, sum inniheldur ítøkiligar reglur fyri vinnuligum virksemi sum fiskivinnu, oljuvinnu og skipaferðslu. Mælt verður til eitt fyribils forboð, sum skal forða fyri vinnuligum virksemi í teimum pørtum av arktiska havinum, sum hava verið undir ísi. Fyribils forboðið skal vera galdandi, inntil ein nýggjur altjóða sáttmáli fyri Arktis er komin í gildi. Hesin sáttmáli skal vera eftir sama leisti sum sáttmálin fyri Antarktis, ið kom í gildi í 1961.

Endamálið við sáttmálanum fyri landøkið í Antarktis var at forða fyri ósemjum millum londini, sum settu fram krøv um landøki í Antarktis. Øll krøv um landøki vórðu fryst, og staðfest varð, at Antarktis er eitt friðað øki, sum er halgað friði og gransking. Somu tankar liggja aftanfyri uppskot um ein samsvarandi sáttmála fyri Arktis.

Tey arktisku londini, harímillum Danmark, halda hinvegin ikki, at tað er neyðugt við einum serstøkum sáttmála fyri Arktis og vísa í hesum sambandi serliga á, at grundleggjandi munurin á Arktis og Antarktis er, at Arktis er eitt hav, ímeðan Antarktis er eitt landøki. Harafturat búgva fólk í londunum kring arktiska havið í mun til Antarktis, har ongin býr.




*Mynd 2: Yvirlit yvir mørk og landgrundskrøv í arktiska havinum. Frágreiðing til myndina kann síggjast á: http://www.dur.ac.uk/ibru/resources/arctic*

[1] UTTANRÍKISRÁÐIÐ, HAVTILFEINGI, HANDIL OG ØKISSAMSTARV MAI 2010 DAGFØRD ÚTGÁVA MAI 2011

Samskiftið millum arktisku strandarlondini fer fram á politiskum stigi í Arktiska Ráðnum.[2] Limalondini eru Canada, Danmark, Finland, Ísland, Noregi, Russland, Svøríki og USA. Grønland og Føroyar eru partur av danska limaskapinum. Føroyar hava síðani 1998 verið umboðaðar á embætisstigi í Arktiska Ráðnum.

Harafturat eru aðrir høvuðspartar á altjóða pallinum, so sum ES, Kina, Japan, Frakland og Bretland, farnir at gera vart við seg í kjakinum um Arktis. Til dømis almannakunngjørdi ES-nevndin ein arktiskan politikk í november 2008 og aftur í 2011.[3]

Væntaðu broytingarnar í Arktis hava eisini ført til, at spurnartekin verður sett við leiklutin hjá Arktiska Ráðnum. Mong finnast at Arktiska Ráðnum við átalum um, at felagsskapurin er ov veikur, og tískil ikki er nøktandi sum einasta millumtjóða samstarv um Arktis. Tað er ein sannroynd, at bygnaðurin í Arktiska Ráðnum er rættuliga veikur í mun til aðrar millumtjóða felagsskapir. Millum annað hevur Arktiska Ráðið ikki heimild at taka avgerðir, sum eru løgfrøðiliga bindandi fyri limalondini, og semja skal vera millum øll limalondini um avgerðirnar.

Seks arbeiðsbólkar eru í Arktiska Ráðnum. Fýra av hesum (Arctic Monitoring and Assessment Programme (AMAP), Conservation of Arctic Flora and Fauna (CAFF), Protection of the Arctic Marine Environment (PAME) og Emergency Prevention, Preparedness and Response (EPPR)) vórðu stovnaðir longu undir umhvørvissamstarvinum AEPS frá 1991. Sum partur av avgerðini um at seta Arktiska Ráðið á stovn, varð arbeiðsbólkurin Sustainable Development Working Group (SDWG) stovnaður, tí avgjørt varð, at Arktiska Ráðið umframt umhvørvisnevnd eisini skuldi fevna um burðardygga menning og livikor hjá íbúgvunum í Arktis. Seinni er arbeiðsbólkurin Arctic Contaminants Action Program (ACAP) komin afturat. Føroysk luttøka er í flestu av arbeiðsbólkunum.

# BÚSKAPARLIG MENNING Í ARKTIS

So hvørt Arktis bráðnar, økist fíggjarliga meingi. Fleiri vinnufólk síggja møguleikar og vilja gagnnýta broyttu umstøðurnar. Í ávísum vinnuøkjum eru fyritøkur longu farnar undir at gera stórar íløgur í Arktis, men aðrar vinnugreinar meta, at tað fer at taka 5, 10 ella 15 ár, áðrenn tær av álvara fara at gera íløgur í arktiska økið.

Í talvu 1 er ein lýsing av vinnumøguleikum í mun til landaøki og tíðarskeið.

[2] http://www.arctic-council.org

[3] A sustainable EU policy for the High North European Parliament resolution of 20 January 2011 on a sustainable EU policy for the High North (2009/2214(INI))

**Talva 1: Nýggir vinnumøguleikar í Arktis**

| Tíðarskeið<br>Stað | **Stutt** | **Miðal** | **Langt** |
|---|---|---|---|
| Vestur Grønland | Námsvinna, Ferðavinna, Fiskaveiða | Olja og gass | |
| Eystur Grønland | Ferðavinna Fiskiveiða | Námsvinna | Olja og gass |
| Norska havið | Olja og gass | | |
| Svalbard | Námsvinna, Ferðavinna, | | |
| Barentshavið | Ferðavinna Fiskaveiða | Olja og gass | |
| Kara Sea | | | Olja og gass |
| Laptev Sea | | | Olja og gass |
| Chukchi Sea | Ferðavinna | Olja og gass | |
| Beaufort Sea | | Olja og gass | |
| Canadian Arctic Archipelago | Ferðavinna | Námsvinna | |
| Northeastern Passage | Skipaferðsla | | |
| Northwestern Passage | Skipaferðsla | | |

*Viðm.: Tíðarskeið er skilmarkað sum: Stutt = minni enn 5 ár; Miðal 5-10 ár, Langt = meira enn 10 ár.*

Sum tað sæst á hesi talvu, er Arktis eitt samansett øki, sum nógv lond kanna sær rættindi til, og hesi lond hava helst ymisk áhugamál og raðfestingar. Við slíkum ymisleika eru møguleikarnir nógvir og ymiskir. Olju- og gassvinnan er ein drívmegi aftanfyri leitingarvirksemi í Arktis, men tað er ikki einasta drívmegin. Námsvinnan veksur alsamt og ger íløgur á sama kapitalstøði sum olju- og gassvinnan, m.a. tí Arktisk inniheldur fleiri sera sjáldsom og virðismikil ráevni, sum verða brúkt í hátøkni vinnum.

Nógv umrøða hevur verið av ferðavinnu og skipaferðslu, men í einum búskaparligum høpi eru báðar íløgurnar munandi minni í vavi enn olju, gass og námsvinnan. Rættiliga ógreitt er enn, í hvønn mun fiskivinnan verður ávirkað, men nógv bendir á, at hitabroytingar í sjónum gera, at nýggj fiskasløg, t.d. makrelur og annar pelagiskur fiskur sum fyrr gekk sunnaliga í Atlantshavinum, gerast meira vanlig norðarlaga. Somuleiðis eru ábendingar um, at botnfiskasløg sum toskur fara at koma aftur á grunnar við Vestur Grønland og Eystur Kanada. Hesi viðurskifti verða greinað nærri í tí eftirfylgjandi.

"The Arctic Co-operation Programme" hjá Norðurlandaráðnum[4] hevur lýst eftir nýggjum verkætlanum, sum tørva fíggjarligan stuðul til menning av burðardyggum vinnuligum virksemi í Arktis. Endamálið er at stuðla tilgongdum, verkætlanum og átøkum, sum fara at styrkja burðardygga menning og dugna fólkinum, sum býr í arktiska økinum, so hvørt ávirkanin av altjóða vinnuáhuganum og veðurlagsbroytingunum gerst týðiligari.

[4] http://www.norden.org/en/nordic-council-of-ministers/ministers-for-co-operation-mr-sam/the-arctic/apply-for-funding-from-the-nordic-council-of-ministers-arctic-co-operation-programme/apply-for-funding-2012-2014

# OLJU OG GASS LEITINGAR Í ARKTIS

Í Grønlandi er eitt stórt olju og gass ríkidømi. Harafturat eru verkætlanir innan frálanda oljuvinnu ávegis. Í seinastuni er virksemið linkað nakað orsakað av, at tað miseydnaðist leiðandi oljufelagnum, Cairn Energy, at finna vinnuliga burðardygga nøgd av olju og gassi, samstundis sum at felagið nýtti 600 milliónir USD í olju leitingar tilgongdini.[5] Leiðslan í Cairn Energy hevur givið lyfti um at halda áfram, men partaeigararnir eru blivnir meira varnir aftaná stóru leitingarútreiðslurnar í Grønlandi.  Onnur feløg so sum Exxon Mobil, Chevron, Statoil og Maersk Oil eru í eini bíðistøðu til fleiri dátu eru tøk. Tað verður væntandi í 2015. Kanningar verða tó enn gjørdar, og feløg, sum eru partar av veitingar vinnuni til olju- og gassleitingar virksemi, eru enn til verka. Tó eru útlitini ikki líka góð fyri oljuvinnuna í Arktis nú, sum tey vóru fyri bert fáum árum síðan.Tað er serliga økta kappingin frá shale gas, saman við varðsemi eftir Deepwater Horizon lekan, ið ger seg galdandi.[6]

Tað eru eisini oljufeløg, sum eru ímóti oljuleiting í Grønlandi. Eitt nú Total S.A. úr Fraklandi er ímóti allari oljuleiting í Grønlandi. Forstjórin Christopher de Margerie hevur í Financial Times sagt, at vandin fyri oljudálking í slíkum umhvørvisviðkvæmum øki er ov stórur. “Oil on Greenland would be a disaster” og “A leak would do too much damage to the image of the company” hevur hann sagt í eini samrøðu við blaðið.[7] Hetta, at ein oljurisi sum Total S.A. hevur tikið eina almenna støðu móti oljuleiting, kann hava neiliga ávirkan á framtíðarútlitini hjá olju- og gassframleiðsluni í Grønlandi. Total S.A. er bert ímóti oljuframleiðsluni og heldur á fram við teirra gass portfolio.

Í ljósinum av “Deepwater Horizon” vanlukkuni krevja fleiri lond eina útseting í mun til olju- og gassframleiðslu í Arktis. Tað týdningarmesta av hesum londum er Ongland. Businessweek sigur frá,[8] at ‘Parliamentary Environmental Audit Committee’ hevur mælt til at steðgað verður við boringunum, inntil betri trygdartiltøk eru gjørd fyri á hendan hátt at sleppa undan oljulekum á støði við Deepwater Horizon vanlukkuna.

Olju og serliga gass leitingar fara fram í Noreg, Russlandi og Kanada, samstundis verður roynt at økja um Prudhoe Bay oljuøkið í Alaska í Arctic National Wildlife Refuge (ANWR). Í áðurnevndu samrøðu við Financial Times sigur de Margerie, at Total S.A. er partur av fleiri gassverkætlanum í russiska partinum av Barentshavinum , einamest í Shtokman økinum, og at munurin er, at gasslekar eru lættari at fáast við enn oljulekar. Tann russiski felagin hjá Total A.S., Gazprom, er ikki heilt so jaligur í mun til økini í Barentshavinum, og hevur víst áhuga at sleppa sær heilt burturúr verkætlanini.

Shell hevur havt trupulleikar við teimum boringum, sum standa fyri framman við strondina í Alaska í Chukchi sjónum, og hevur valt at útseta royndarboringar. Shell hevur nýtt 7 ár og 4,5 milliardir USD upp á verkætlanina uttan at finna vinnuliga burðardyggar nøgdir.[9] Samstundis hevur Shell fingið loyvir til at byrja oljuboring í tí amerikanska partinum av Beaufort sjónum.

---

[5] http://www.theglobeandmail.com/report-on-business/international-business/cairn-fails-to-find-oil-and-gas-off-greenland/article4179903/ Cairn fails to find oil and gas off Greenland
[6] http://www.france24.com/en/20121022-arctic-allure-fades-oil-companies Arctic allure fades for oil companies
[7] http://www.ft.com/intl/cms/s/0/350be724-070a-11e2-92ef-00144feabdc0.html Total warns against oil drilling in Arctic
[8] http://www.businessweek.com/news/2012-09-19/u-dot-k-dot-lawmakers-call-for-moratorium-on-arctic-oil-and-gas-drilling U.K. Lawmakers Call for Moratorium on Arctic Oil & Gas Drilling
[9] http://www.denverpost.com/business/ci_21565959/shell-scraps-drilling-alaskas-chukchi-sea Shell scraps drilling in Alaska's Chukchi Sea

Husky Energy økir um olju-sand virksemið í tí kanadiska partinum av Arktis saman við BP, og hevur ætlanir um at økja um framleiðsluna við 50% í 2020.[10] Olju- og gassleiting fram við strondini í Labrador er ment við seismiskum rannsóknum fyri at kanna økið. Leitingarloyvini verða latin av tí kanadisku stjórnini, og við at fleiri upplýsingar verða tøkar hjá oljufyritøkunum, verður væntað at farið verður undir oljuboring innanfyri tey næstu árini.

Tað norska oljufelagið Statoil hevur byrjað framleiðslu á Snøhvit økinum í tí norska sjónum fram við strondini uttan fyri Hammerfest. Sambært UPI hevur Statoil boðað sínum samstarvsfelagum frá, at kanningar á brunnunum hava víst, at tað ikki eru vinnuliga burðardyggar nøgdir til at økja um framleiðsluna, men at teir fara at endurkanna avgerðina um, hvørt fleiri leitingar eftir náttúrugassi skulu gerast.[11]




*Mynd 3: Oil and Natural Gas Resources of the Arctic - Map by Geology.com*

Í stuttum kann út frá omanfyri standandi verða sagt, at tað er týðiligt, at oljuleiting í Arktis er váðafull, bæði í mun til seismiska vitan, men eisini í mun til almennan baksláttur. Gassleitingar eru vorðnar lættari at selja av teirri orsøk, at náttúru árinini av gassdálking er nógv minni samanborin við oljudálking. Olju- og gassleitingarnar eru á núverandi støði ikki í framleiðslu burtursæð frá Prudhoe og Snøhvit. Útlitini í mun til at uppstiga leitingina til vinnuliga framleiðslu er ikki sannlík á styttri sikt, men heldur á miðal til longri sikt.

[10] http://www.theglobeandmail.com/report-on-business/industry-news/energy-and-resources/husky-targets-50-production-hike-by-2020/article1316471/ Husky targets 50% production hike by 2020
[11] http://www.upi.com/Business_News/Energy-Resources/2012/10/02/Barents-Sea-gas-disappoints-Statoil/UPI-56411349174604/ Barents Sea gas disappoints Statoil

# RÁEVNI Í GRØNLANDI

Menniskja hevur leingi leita og útvunnið ráevni norðan fyri polkringin. Gullgravara tíðin í Klondike við endan av 19. øld var bert byrjanin, samstundis varð byrjað við kolanámum á Svalbard og aftaná varð farið eftir tí svarta gullinum á oljufeltinum við Prudhoe Bay í Alaska. Nógv onnur dømi eru, tí Arktis er eitt serliga ríkt øki, tá talan er um gull, silvur, platin, gimsteinar, uran, olju og onnur virðismikil evni. Hetta er tí at grundfjalli í Arktis er sera gamalt, bert partar av Suðurafrika og Avstralia kunnu samanberast við hetta økið innan jarðfrøði, og í hesum gamla grundfjalli finnast grót av bæði sediment og vulkaniskum uppruna. Hesar nógvu ymisku lindir eru heldur ikki so djúpt goymdar sum í øðrum heimspørtum, vegna glacialu dalrnar, sum eru skaptir av ísinum.

Av tí at Arktis bráðnar og verður meira ísfrítt, verða fleiri nýggj øki atkomilig fyri ráevnisvinnu, og við einum heimi, sum bert hevur vaksandi tørv eftir hesum evnum, eru fleri feløg farin undir at gera fyrireikingar, eitt nú í Grønlandi. Hetta eru risa verkætlanir, har brúk verður fyri nógvum serkunnleika. Dømi um hvussu kapitalur flokkast til Arktis, eru tann hjá ensku fyritøkuni London Mining, amerikansku Alcoa og avstralska Greenland Minerals & Energy Ltd.

## Case I: London Mining

London Mining er í gongd við at fyrireika eina verkætlan í Isua, ið er 150 km norðanfyri Nuuk. Samlaði verkætlanar kostnaðurin er mettur til at vera 2,2 milliardir USD, ella umleið 13 milliardir DKK.[12] Ætlanin er, at námið í Isua skal útvinna 15 milliónir tons av jarnmálmi um árið í 15 til 30 ár.




*Mynd 4: Isua Project London Mining 2011*

Allar royndarboringar eru gjørdar, somuleiðis er pilot skala verkætlanin gjørd, og umhvørvis og sosialar kanningar (environmental impact assessment & social impact assessment) eru eisini gjørdar. Í verkætlanini er ikki bert eitt stórt nám, men eisini ein stór havn, flogvøllur og vegir, ið knýta alt hettar saman. Kinesisk

[12] http://www.londonmining.co.uk/overview-isua.aspx

feløg skulu reka námið, og nógv er gjørt fyri at fáa verkætlanina at vera væl umtókta millum grønlendingar.

## Case II: Alcoa

Alcoa, ið hevur virksemi á Reyðafirði í Íslandi, er farið undir at leggja síðstu hond á eina verkætlan við Maniitsoq/Sukkertoppen. Ætlanin er at gera eitt smeltiverk til aluminium og í tí sambandi eisini tvey vatnorkuverk, ið skulu framleiða ta orku, ið smeltiverkið krevur. Harafturat er ætlanin at gera vegir og eina havn til at avskipa framleiðsluna til heimsmarknaðin.



*Mynd 5: Project Update presentation, Alcoa 2011*

Felagið metir, at umleið 1000 føst arbeiðspláss fara at standast av hesari verkætlan, og at byggistigið krevur 2500-3000 arbeiðsfólk. Samlaði byggikostnaðurin er mettur til 20 milliardir DKK. Alcoa brúkar teirra íslendska virksemi sum dømi um, hvat teir ætla at gera í Grønlandi, og teir leggja stóran dent at lokal arbeiðsmegi tekur lut í verkætlanini.[13]

## Case III: Greenland Minerals & Energy Ltd.

Greenland Minerals & Energy Ltd. (GME) er í ferð við at fyrireika eina verkætlan sunnantil í Grønlandi, við Kvanefjeld, ið er millum Narsaq og Narsarsuaq.[14]

[13] http://www.aluminium.gl/en/about-project
[14] http://www.ggg.gl/projects/specialty-metals-kvanefjeld/




*Mynd 6: Presentation Greenland Minerals and Energy Ltd. 2012*

Kvanefjeld er tað næststørsta REE (rare-earth elements) miðið og sættstørsta uranium miðið í heiminum. GME væntar at byrja námsvirksemi í 2016, men áðrenn teir kunnu byrja, skulu nøkur endalig loyvi fáast til vega, av tí at uranium er geislavirki evni. Felagi hevur fingið fyrrverandi landsstýrisformannin, Lars Emil Johansen, í nevndina, og roynir av øllum alvi at fáa hesa 15 milliarda DKK verkætlanina endaliga góðkenda av landsstýrinum. Sjálvt um felagið ikki fær endaligt loyvi til at útvinna uran, so verður áhugin fyri økinum kring Kvanefjeld verandi, tí tað hevur eina risastóra nøgd av REE. Rare Earth Elements eru t.d frumevnini neodymium, promethium, cerium og yttrium, ið øll verða gagnnýtt innan hátøkniframleiðslu.

Fleiri onnur feløg hava námsloyvir tætt upp at loyvinum hjá GME og ætla at útvinna REE. Tað er bert ein spurningur um tíð, áðrenn tær verkætlanirnar eru komnar so mikið langt, at tær kunnu byrja.

Hesar verkætlanir er ikki eindømi. Tað eru fleiri aðrar verkætlanir í milliarda USD klassanum, ið eru ávegis í Grønlandi, og grønlendska heimastýrið hevur givið 75 leitingarloyvi í 2011. Hesi loyvi eru eftir ymiskum ráevnum, alt frá gull og gimsteinar, til uran og olju. Tað, sum er av týdningi, er at skilja, hvussu stórar hesar verkætlanir eru, tí tær eru av einari støðd, sum føroyingar als ikki eru vanir við. Tær tríggjar omanfyri nevndu verkætlanirnar hava tilsamans ein verkætlanarkostnað á umleið 50 milliardir DKK, tvs. at um føroyskar fyritøkur kunnu lata veitingar fyri bert 1% av hesum trimum verkætlanunum, so er tað eitt søluvirði á 500 milliónir DKK, og har eru 72 onnur loyvi í skrivandi løtu í Grønlandi.

Møguleikar eru hjá føroyskum fyritøkum at veita tænastur til hesar stóru verkætlanir. Tað áhugaverda er, at brúk er fyri veitarum, sum kenna til økið, umhvørvið og hvør útgerð skal til, fyri at virksemi eydnast. Grønlendskar og íslendskar fyritøkur eru longu farnar undir søluátøk fyri at gera vart við seg. Í byrjanini av november 2012 vóru grønlendskar og íslendskar fyritøkur á sølustevnu í Kina, har avtalur um undirveitingar verða gjørdar. Vert er at býta merki í, at millum annað vóru bert tvey flogfeløg umboðaði,

Air Greenland og Norlandair, ið bæði væntað sær stórar ordrar sambart Sermitsiaq.[15] Feløgini siga, at tey longu nú hava fingið góða úrtøku úr leitingarstiginum, har fólk og farmur skal flytast millum meginlandið og Grønland, og tey vænta at fáa meira at gera í framtíðini. Samstundis fræettist frá teimum, sum arbeiða við námsvirksemi í Grønlandi, at alt ov lítil kapping er á m.a. loftvegis flutningsøkinum.

Ikki bert flogfeløg vænta sær nógv burturúr framtíðini. Millum annað MT Højgaard, Royal Arctic Line A/S og Arctic Import A/S hava ligið framvið, tá kinesisk ferðaløg hava vitja.[16] Hesi grønlendsku, íslendsku og donsku feløg eru komin langt í tilgongdini at gerast undirveitarir til námsvinufeløg, og nøkur av teimum hava longu fingið ordrar. Tey boða frá, at teirra meting um framtíðina er sera góð. Um føroyskar fyritøkur hava hug til at bjóða seg fram á sama hátt, so er tað av týdningi, at tær nú gera vart við seg, antin sum sjálvstøðugir veitarar, ella sum samstarvspartrar hjá grønlendskum feløgum.

Enn er ikki avgjørt, hvørjar leiðreglur heimastýrið í Grønlandi fer at hava viðvíkjandi útlendskari arbeiðsmegi í hesum verkætlanum. Arbeitt hevur verið við hesum í nøkur ár, og hetta er eitt politiskt eymt mál í Grønlandi.

Í hesum sambandi er helst skilagott, at føroyska vinnan umhugsar sína framtíðar støðu í eini grønlendskari námsvinnu, eisini sum partur av ríkisfelagsskapinum. Í so máta er eisini viðkomandi at umhugsa, hvussu Føroya Landsstýri kann ávirka gongdina føroyskari vinnu til fyrimunar og tryggja, at t.d. møguleikar hjá føroyskari vinnu og arbeiðsmegi verður javnsett tí donsku.

[15] http://sermitsiaq.ag/node/139730 Kinesiske minefolk skal forgylde Air Greenland
[16] http://sermitsiaq.ag/node/139713 Kina drager Grønland

# NORÐURLEIÐIRNAR - NORÐEYSTLEIÐIN OG NORÐVESTLEIÐIN

Norðurleiðirnar eru siglingarleiðir, ið binda Atlantshavið og Kyrrahavið gjøgnum Arktis. Stutt sagt eru tvær leiðir: norðvestleiðin - frá Labrador til Beringsundið; og norðeystleiðin - frá Barentshavinum til Beringssundið. Hesar siglingarleiðir hava leingi bert havt áhuga í samband við rannsóknarferðir, men so hvørt ísurin bráðnar, er áhugin vaksin fyri hesum siglingarleiðum.




*Mynd 7: Arctic sea ice extent on August 24, 2010. Compiled by the University of Illinois Cryosphere Today.*

Russland hevur lagt nógva politiska orku í at gera norðeystleiðina til eitt vinnuligt alternativ til Suez veitina. Við Putin forseta á odda hevur Russland lova fyritøkum, ið nýta hesa siglingarleið, fíggjarligan vinning.[17] Hetta slagi av politiskum stuðli ger, at norðeystleiðin væntast at kappast við Suez innan fá ár. Nú, í 2012, er leiðin frí fyri ís tríggjar mánaðir um árið, og hetta væntast at blíva seks mánaðir innan 2020. Longu nú eru skip upp til 120.000 tons, ið ferðast eftir hesari leið, og serliga bulk-, gass- og oljuskip síggjast sigla.

Norðvestleiðin er eisini roynd, og skip upp til 43.000 tons hava ferðast eftir henni, men av tí at kanadiska stjórnin er meira tilvitað innan umhvørvisspurningar, er hendan leiðin ikki brúkt líka nógv sum norðeystleiðin. Hetta er ein sera eymur politiskur spurningur millum Kanada og USA, ið vil sleppa at brúka leiðina, sum um talan er um altjóða sjógv. Higartil hevur kanadiska stjórnin í Ottawa noktað fyri hesum.  Av tí at tann

[17] http://www.platts.com/RSSFeedDetailedNews/RSSFeed/Shipping/8376013 Russia wants Northern Sea Route to become major trade route: Putin

politiska unidrtøkan ikki er hin sama, verður ikki mett, at Norðvestleiðin verður ein størri siglingarleið enn Norðeystleiðin.

Ein spurningur, sum sjáldan verður settur, tá ið tosað verður um hesar siglingarleiðir, er, í hvønn mun tær eru besta leið í mun til tær havnir, sum siglt verður ímillum. Í talvu 2 er eitt yvirlit, sum lýsir hesi viðurskifti. Sum sæst, so er tað ofta soleiðis, at um havnarbýirnir eru tætt við Ekvator, so er betri at fara um Suez ella Panama.

**Talva 2: Samanbering av siglingar teinum**

**Are the northern sea routes really the shortest?**

Distance in km between harbours using various southern and northern routes

| Route | Panama Canal | Northwest Passage | Northeast Passage | Suez and Malacca |
|---|---|---|---|---|
| London - Yokohama | 23.300 | 15.930 | 13.841 | 21.200 |
| Marseilles - Yokohama | 24.030 | 16.720 | 17.954 | 17.800 |
| Marseilles - Singapore | 29.484 | 21.600 | 23.672 | 12.420 |
| Marseilles - Shanghai | 26.038 | 19.160 | 19.718 | 16.460 |
| Rotterdam - Singapore | 28.994 | 19.900 | 19.641 | 15.750 |
| Rotterdam - Shanghai | 25.588 | 17.570 | 15.793 | 19.550 |
| Hamburg - Seattle | 17.110 | 15.270 | 13.459 | 29.780 |
| Rotterdam - Vancouver | 16.350 | 14.330 | 13.445 | 28.400 |
| Rotterdam - Los Angeles | 14.490 | 15.790 | 15.252 | 29.750 |
| Gioia Tauro (Italy) - Hongkong | 25.934 | 24.071 | 21.556 | 14.093 |
| Barcelona - Hongkong | 25.044 | 23.179 | 20.686 | 14.693 |
| New York - Shanghai | 20.880 | 17.030 | 19.893 | 22.930 |
| New York - Hongkong | 21.260 | 18.140 | 20.982 | 21.570 |
| New York - Singapore | 23.580 | 20.310 | 23.121 | 18.770 |

Marginally longer route | Shortest route

All numbers calculated by Frédéric Lasserre in SIG Mapinfo, except the numbers for the Northeast Passage through the Kara Strait south of Novaya Zemlya which have been calculated in Google Earth by Svend Aage Christensen.

Talva 2 gevur ábendingar um, at vit ikki skulu vænta ov nógv av nýggju siglingarleiðunum, t.d. tá hugt verður eftir trimum teimum størstu havnabýunum í heiminum, Shanghai, Rotterdam og Singapore. Um siglast skal frá Singapore til Rotterdam, eru báðar norðurleiðirnar longri enn yvir Suez, meðan norðeystleiðin er best millum Shanghai og Rotterdam. Hettar merkur ikki, at tær nýggju siglingarleiðirnar eru óbrúkiligar, t.d. er nærliggjandi at hugsa at tann nýggja ráevnisvinnan í Arktis fer at gera gagn av norðurleiðunum.

Hinvegin er umráðandi at hava í huga, hvat slag av sigling fer at vera eftir hesum leiðum. Harafturat seta siglingarleiðirnar krøv til skipaslag og skipastødd, og í tí sambandi verður neyðugt við umskipingarhavnum. Bæði í Murmansk, í Norðurnoregi og á eysturlandinum í Íslandi hevur verið arbeitt við gera slíkar umskipingarhavnir. Um føroyingar skulu gera seg galdandi í hesi kapping, er neyðugt at gera sær greitt, júst hvørji skipasløg, og hvat slag av farmi føroyingar ynskja at bjóða seg til at umskipa. Harnæst eiga áhugagreiningar í mun til marknaðarmøguleikar, útbyggingartørv og umhvørviðsviðurskifti at verða gjørdar.

# AVBJÓÐINGAR Í ARKTIS

Við teimum nýggju vinnu møguleikum í Arktis koma eisini avbjóðingar, serliga innan umhvørvi og trygd. Umhvørvið í Arktis er sera viðbrekið, og er eitt hitt síðsta stóra órørda økið á jørðini. Umhvørvisfelagsskapir royna tí av øllum alvi at gera seg galdandi innan hetta økið, og politiska valdið í londunum kring Arktis eru serliga varug við henda áhuga. Fleiri av londunum í Arktiska ráðnum hava stranga umhvørvislóggávu galdandi fyri teirra part av Arktis. Tó er Russland eitt undantak í so máta. Allar størri verkætlanir í Arktis, uttan fyri russiskt øki, skulu tó standa mát í mun til eina kanning av umhvørvisávirkan (environmental impact assessment), og nú ofta eisini "social impact assessments".

Tann stórsligna náttúran við teimum stóru avbjóðingunum er eisini í sjálvum sær eitt aktiv innan ferðavinnuna. Henda økist í Arktis hvørt ár, og fleiri og fleiri stór cruise skip eru at síggja norðanfyri. Ferðavinnan er tó ikki altíð so vælkomin, og kanningar vísa, at tað er torført at fáa cruise gestirnar at leggja pening eftir seg. Í so máta er upplivingarferðavinna heldur betri fyri. Henda ferðavinnugrein fevnir um veiðu, fiskarí, kajakk, gongutúrar og annað, sum gevur stórbýarfólkum frá meginlandinum eina uppliving av "villmarkini". Hetta slagi av ferðafólkum gagnnýta lokalu tænastuvinnuna á ein ferðvinnuliga nógv meira áhugaverdan hátt við at brúka ferðaleiðarar, skiparar, útgerðarfelag og handlar. Tey eta á lokalum matstovum og sova á hotellum í teimum bygdum og býum, tey koma til. Cruise skip hava harafturímóti alt hettar við sær umborð.

Trygd er serliga týdningarmikil í Arktis, av tí at náttúran er serliga ófyrigevandi, og tað minsta óhappið kann blíva lívshættisligt, um tað hendir á skeivum stað ella á ávísari tíð á degnum. Orsakað av hesum er serligur dentur lagdur á at fáa JRCC/MRCC [18] infrakervi at virka. Í maj 2011 undirskrivaðu tær átta tjóðirnar í Arktiska ráðnum ein felags sáttmála um Arktis search-and-rescue (SAR). Hesin sáttmálin leggur dent á samstarv tvørtur um landamørk. Sjálv umsitingin av hesum samstarvi er millum almennar myndugleikar, men væntað verður, at privatir fyritøkur fara at veita útgerð og arbeiðsfólk. Hendan vinnan boðar eisini frá, at hon væntar vøkstur inntil 2020, so hvørt sum fleiri og fleiri feløg fara at útvinna ráevni í Arktis.

SAR avtalan er ikki tann einasti parturin. Vandin fyri olju- og gasslekum er frammarlaga í huganum hjá øllum politikarum og fyrisitingarfólki. Arktiska ráðið arbeiðir í løtuni við einari bindandi avtalu fyri fleirtjóða samstarv, sum skal gera tað lættari at taka upp eftir møgulig størri óhapp..

IMO arbeiðir við at gera eina "Polar Code" fyri skipaferðslu. Tá ið henda er samtykt, so fara stjórnir, felagsskapir og fyritøkur at hava nakrar karmar at halda seg til í mun til at gera viðkomandi leiðreglur. Henda "Polar Code" fer at fevna um vandar, sum er knýttir at virksemi í arktisku høvunum. Tískil fer "Polar Code" at innihalda standardir fyri skipabygging, arktiska trygdarútgerð og krøv um førleikar til at navigera í ísfyltum sjógvi. Arbeitt hevur verið við hesum í fleiri ár, men við økta virkseminum í Arktis er verulig ferð komin á arbeiðið, har ið Lloyds, DNV og onnur klassingarfeløg arbeiða saman við nationalum stjórnum um at røkka eini semju.

[18] JRCC - Joint Rescue Coordination Centre hevur ábyrd fyri fleiri økið, bæði á landi, sjógvi og í loftrúminum. MRCC Maritime Rescue Coordination Centre hevur ábyrd fyri eitt avmarka maritimt økið.




Arctic Tourism Sites by the Wall Street Journal

Høvudsmálið er at finna eina javnvág millum tað økta virksemið í Arktis, ið krevur meira trygd og infrakerv, at varðveita tær órørdu víddirnar, og eisini at syrgja fyri at lokalsamfeløgini hava vinnumøguleikar, so livast kann har. Hvussu henda javnvág fer at hepnast verður helst ymiskt í mun til, hvat land talan er um, tí londini leggja ymiskan dent á ymisk viðurskifti alt eftir teirra egnu virðismeting.

# KAPPINGARLIGIR FYRIMUNIR HJÁ FØROYSKU VINNUNI

Útjarðarasamfeløg sum Føroyar, Ísland, Norðurnoregi, Grønland og Newfoundland eru í stóran mun tengd at rávøruvinnu. Serliga fiskivinnu og alivinnu, men eisini olju-, gass- og námsvinnu.

Eyðkenni fyri slíkar vinnur er, at kappingarførið er tengd at staðnum, har ið rávøran verður veidd, ald ella fingin úr jørðini. Tað eru samfeløgini, sum so at siga sita á tilfeinginum, og tá ið marknaðir um allan heim hava tørv á hesi rávøru, so er eisini grundarlag fyri vinnuligum virksemi.

Øðrvísi er í vitanarbúskapinum, har ið kappingarførið er tengd at førleikanum at loysa ein ítøkiligan trupulleika, har kundin er, tað verið seg at veita eina ávísa tænastu ella verða tað avgerandi ískoyti til at fáa eina ávísa framleiðslugongd at hepnast. Hetta kann vera innan vega- og havnargerð, flutning, matvøruframleiðslu, orkuframleiðslu ella serkunnleika, sum vit við okkaru maritimu staðseting duga betri enn onnur.

Vinnumøguleikar eru tó bert tilstaðar, um vit duga at fara út á marknaðin, eyðmerkja tørvir og veita loysnir, vinna álit og sannføra kundan um, at vit eru kappingarfør í dygd og prísi, hóast vit virka í Føroyum. Fyri at koma hartil krevst onkuntíð gransking, oftani menning og heilt víst eitt “global mindset” í vinnuframferðini, sum er av heilt øðrum slag enn í tí rávørubúskapi, vit eru von við.

Í hesum búskapi er Human Capital avgerandi – í hvønn mun hava vit einstaklingar, sum hava hegni og førleikar at vinna á teim bestu úti í heimi?

Hvussu kann føroysk vinna gagnnýta teir nýggj møguleikar, sum greiningin omanfyri hevur ávíst, so at hesir verða gjørdir til ítøkiligan vinning fyri landið sum heild? Hvat kunnu Føroyar bjóða fram í mun til onnur lond í Arktis; og á hvørjum økjum eru Føroyar mest kappingarførar í mun til tilgongdina í arktiska økinum? Hvørjar tillagingar skulu vit fremja, og hvørjir førleikar skulu mennast?

Í hesi frágreiðing verður nomið við vinnugreinarnar skipaferðslu, veitingar til olju og gass, veitingar til námsvinnu, fiskivinnu og ferðavinnu. Fyrst verður kappingarstøðan sum heild lýst fyri økið.

Sæð í altjóða høpi eru tað ein ørgrynna av fyritøkum, sum er áhugaðar at bjóða seg fram og royna at vinna sær fyrimun av teimum nýggju búskaparligu veruleikunum fyri norðan. Hesar fyritøkur eru bæði tær, sum eru staðsettar í arktiska økinum, og eisini tær frá grannalondunum og frá londum so langt burturi sum Kina. Tað eru ymsar røkur at ganga fyri at uppnáa kappingarligar fyrimunir, og nógvir møguleikar fyri at samstarva tvørturum vinnugreinar. Í talvu 3 er ein avmarkað greining av kapitali og arbeiði, ið sæst aftur í fleiri av teimum verkætlanum, ið eru í gerð.

**Talva 3: Kapitalur og arbeiði í ávísum verkætlanum í gerð.**

| Býtið av kapitali og arbeiðsmegi | |
|---|---|
| Anglo-Amerikonsk orku og tilfeingis feløg | Verkætlanarmenning og høvuðsstigtakari av verkætlanum |
| Kinversk byggi og verkfrøðingafeløg | Arbeiðið, ið krevja stóra arbeiðsmegi, “mega project” liðugtgerð |
| Lokalar fyritøkur | Undirveitarar við ávísari servitan |

Primus motor er ofta eitt felag, ið hevur sterkar fíggjarligar karmar og hevur drúgvar royndir innan verkætlanarmenning og kanningar, feløgini eru oftast orku- og tilfeingisfeløg frá Kanada, Avstralia, Bretlandi ella Amerika. Hesi feløg hava tikið leiðsluna í menningini av verkætlanum í Arktis, og eru oftast primus motor fyri sjálvt kanningararbeiðið og eiga tískil verkætlanina. Tá verkætlanin er klár til framleiðslufasuna, verða partar av verkætlanini seldir til fíggjaríleggjarar frá Kina og Miðeystri ella til onnur fleirtjóða orkufeløg, soleiðis at fíggjarligi vágin er lagdur á fleiri herðar.

Undir hesum feløgum er eitt lag av feløgum, ið eru serfrøðingar í at fáa hesar risa verkætlanir undir land. Innan oljuvinnu er utað t.d. feløg sum Halliburton og Transocean, meðan innan námsvinnu eru tað serliga kinesisk feløg, ið gera seg galdandi. Hesi feløg hava positionera seg soleiðis at tey hava arbeiðsfólki, tøknina og vitanina, ið krevst til at realisera risa verkætlanirnar, ið tey ensk-amerikansku feløgini hava ment.

Hesi feløg hava aftur undirveitarar, ið hava serkunnleika innan operatiónsøkið og arbeiða við uppgávum, ið krevja hendan serkunnleika. Hettar eru oftast grønlendsk, norsk og íslendsk feløg, ið hava positionera seg soleiðis, at tey verða kontraktað sum undirveitarar við serkunnleika í at arbeiða í Arktis.

Vitanin um, hvussu ein ber seg at í Arktis, er høgt í metum og er ein stórur kappingarligur fyrimunir. Trupulleikin liggur í at skjalfesta hesa vitan, soleiðis at fleirtjóða fyritøkur trygt kunnu minka um sín váða. Hetta er nakað, ið hesi feløg raðfesta sera høgt. Hettar merkur, at vitanin um Arktis og íshavsvinnu má gerðast um til sertifikatir, ið eru góðkend av feløgum, sum tryggingarfeløg kunnu líta á. Hetta eru t.d. klassingarfeløg sum Lloyds, DNV, BV, v.fl. Tess meira hendan vitan kann vera kodifisera, tess betri er tað fyri tey feløg, ið hava drúgvar royndir innan økið. IACS er farið undir arbeiðið saman við IMO um millum annað Polar Code, men meira er at gera innan økið.

Inntil hetta hendir, er Arktis líkt "the wild west", tvs. at feløg kunnu arbeiða uttan at hava fingið nógvar sertifiseringar, men so hvørt hetta økið verður meira skipað, er tað av sera stórum týdningi at vera frammarlaga í hesi gongd. Seinni, tá ið reglur eru gjørdar, verður tað verri fyri nýggj feløg at gera seg galdandi og at koma inn á marknaðin.

Føroysk feløg eiga at fokusera á vinnugreinar, har tey longu hava eina stóra vitan. Tey fáa ikki hjálp frá lóggávuvaldi og handilsforðingum sum t.d. grønlendsk og norsk feløg, og tey eru ikki betri fyri landafrøðiliga sæð enn íslendsk feløg. Tískil eru føroyskar fyritøkar noyddar til at kappast grundað á teirra førleikar. Í so máta hava føroyskar fyritøkur longu gjørt sær royndir, m.a. í frálandavinnuni í Norðsjónum og aðrastaðni seinastu 10 árini. Harafturat hava føroyingar siglt og fiska í Norðurhøvum kring Arktis í nærum 100 ár, frá fiskiskapi undir Grønlandi í slupptíðini, til Føroyingarhavinina og núverðandi fiskiskap í Barents havinum, við Svaldbard, Bjarnoydna, Irmingarhavið, vm.

Vitanin frá at arbeiða í hesum høvum, og frá tænastu- og útgerðarvinnuni, ið veitir til hesa vinnu, kann brúkast til at arbeiða fyri tey anglo-amerikansku feløgini og teirra veitarar. Afturat hesum eigur at verða kannað, um møguleiki er fyri, at føroysk feløg kunnu fáa framíhjárætt í Grønlandi, av tí at Føroyar og Grønland eru í rikisfelagskapi saman við Danmark. Í øllum førum eigur at verða tryggjað, at føroysk og donsk feløg verða javnsett, tá umræður vinnumøguleikar í Grønlandi.

1. **Skipaferðsla og útgerðarvinna:** Skipaferðslan økist í Norðuratlantshavi og føroysk feløg hava møguleika fyri øktum virksemi av hesum. Útgerðarvinnan í Føroyum kann kappast við útgerðarvinnu í londunum kring okkum, serliga tá talan er um skip, ið ferðast frá Norðsjónum til Eysturgrønland. Norðurleiðirnar eru longu undir menning, og sum lýst í greiningini av teimum eru skip yvir 120.000 BRT, ið ferðast fram við Sibiria. Tíverri eru útlitini fyri umskiping ikki góð, tá talan er um bulkskip og tangaskip. Eisini skal havast í huga, at Russland fer at leggja seg eftir hesari vinnugrein. Um føroyingar skulu gera seg galdandi í hesi kapping, er neyðugt at gera sær greitt, júst hvørji

skipasløg og hvat slag av farmi føroyingar ynskja at bjóða seg til at umskipa. Harafturat er neyðugt at gera áhugagreiningar í mun til marknaðarmøguleikar, útbyggingartørv og umhvørviðsviðurskifti.

2. **Tænastuvinnu til oljuídnaðin:** Greiningin av oljuvinnuni í Arktis staðfesti at tænastuvinnan, ið er knýtt at henni hevur góð útlit komandi árini. Fleiri feløg eru ígongd við kanningararbeið,i og serkunnleiki innan økið er høgt í metum. Føroysk feløg innan veitingar og vaktarskip, loftvegis flutning og útvegan av arbeiðsmegi eru longu í gongd við at staðfesta seg sum veitarar hjá norskum olju- og gassleitingum í Arktis, men har eru fleiri mið at royna.

3. **Tænastuvinnu til námsídnaðin:** Námsverkætlanirnar í Grønlandi krevja útbygging av infrakervinum við nýggjum vegum, havnum og flogvøllum. MT Højgaard í Grønlandi væntar sær nógv av hesum ætlanum, og føroysk feløg eiga at gera vart við seg, bæði byggifeløg og verkfrøðingafeløg. Tað er av týdningi at gera sær greitt, at her er talan um veitingar til útbyggingar av infrakervinum og ikki námi sjálvt. Ferðavinnan kann eisini finna vinnumøguleikar her. Air Greenland og Norlandair vænta sær nógv virksemi frá hesum verkætlanum, serliga við at flyta námsarbeiðarar, matvørur og annað, ið ikki er egnað til sjóflutning.

4. **Fiski og alivinnu:** Heitari sjógvur hevur við sær, at fiskurin flytur seg í ein útnyrðing. Hetta er serliga galdandi fyri makrelin, men aðrir fiskastovnar væntast at flyta seg eftir sama mynstri. Hetta ber í sær møguleikar fyri einari øktari alivinnu í Suðurgrønlandi í framtíðini. Núverandi vinna er ikki av týdningi, men broytingar í veðurlagnum gera at umstøðurnar fyri laksaaling í Suðurgrønlandi við tíðini kunnu samanberast við Ísland og Norðurnoreg. Av serligum týdningi er, at villur laksur ferðast frá Evropa og Kanada til Davisstræti og støðast har ein stóran part av tíðini, áðrenn hann vendur aftur. Tað vil siga at sera góðar natúrligar umstøður finnast fyri off-shore aling í grønlendskum sjógvi.

5. **Gransking:** Við alsamt vaksandi granskingararbeiði í Arktis eru vinnumøguleikar fyri føroysk feløg. Arctic Research Support and Logistics er ein vinna í vøkstri; har flutningsfeløg og onnur við serkunnleika innan virksemi í Arktis hava møguleikar. Harafturat hevur Norðurlandaráðið eina serliga skipan, sum stuðlar menningar- og granskingarverkætlanum í arktiska økinum. ES ætlar eisini í nýggja Horizon 2020 stuðulsskipanini at stuðla verkætlanum, sum føra til økta vitan um burðardygga vinnumenning í Arktis. Føroyskar fyritøkur eiga at koma sær uppí slík samstørv, bæði fyri at menna og nema sær vitan, og fyri at skapa sambond út í heim.

Við støði í hesi greining kann staðfestast, at veitingarfeløg til olju- og gassvinnuna, byggi- og verkfrøðingafeløg til námsvinnuna, og sjóvegis og loftvegis flutningsfelag umframt alivinnan eiga at kunna seg um møguleikarnir í Arktis. Serliga er Grønland áhugavert uppá stutt sikt, og í hesum sambandi eigur føroyska vinnan og Føroya Landsstýri at finna ein felags leist fyri, hvussu ríkisfelagsskapurin kann brúkast til at vinna føroyskum fyritøkum kappingarfyrimun í Grønlandi.

# UPPSKOT UM TILMÆLI TIL FØROYA LANDSSTÝRI

Við støði í omanfyristandandi greining verður fylgjandi skotið upp um, hvussu føroysk vinnulig luttøka kann styrkjast, og hvussu Føroyar best gagnnýta fyrimunirnar av broytingunum, sum henda í arktiska økinum.

1. Fylgja sertifiseringsarbeiðinum, ið fer fram í altjóða høpi, soleiðis at føroyskt vinnulív er til reiðar, tá nýggjar lógir og reglur koma í gildi innan økið. Skipað fyri at føroyingar hava møguleika fyri at ogna sær hesar sertifiseringar, tá ið tær vera altjóða krav.

2. Samstarva við grønlendskar politikarar og embætisfólk, millum annað gjøgnum rikisfelagsskapin, og arbeiða miðvíst fyri at føroyskt vinnulív fær somu atgongd til virksemi í Grønlandi sum danskar fyritøkur.

3. Skipað fyri at føroysk feløg eru umboðað á altjóða handilsferðum um vinnu í Arktis, soleiðis at millum annað kineskisk og anglo-amerikansk feløg gerast varug við møguleikan at nýta føroyskar fyritøkur sum veitarar í hesum sambandi.

4. Áhaldandi styrkja um føroysua luttøkuna í Arktiska Ráðnum og stuðla føroyskum áhugamálum at koma uppí tær granskingar- og menningarverkætlanir, sum Norðurlandaráðið og ES eru við til at fíggja.

5. Í samstarvi við vinnuna skipa fyri handils- og kunningarferð vestur í hav til Íslands, Grønlands og New Foundlands, fyri at kunna seg um tey vinnuligu átøk, ið fara fram í hesum økjum, og skapa persónlig sambond ímillum føroyska vinnu og virksemi í teim ymsu londunum. Tað er av týdningi, at hetta verður gjørt í samstarvi við hægsta stig í tí politisku skipanini, so at lættari verður at koma á gátt hjá viðkomandi pørtum. Hetta fer eisini at vera ein kunning til vinnu og myndugleikar í mun til tær avgerðir, sum skulu takast í framtíðini í mun til vinnuligu møguleikarnar í Arktis.